# TILTØK

SAMBAND
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo
tlf 341846

**Gudstænastur**
**2. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Petur Martin Rasmussen
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Heri Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen. ***Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku sjómansmissiónina***
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Kvívík:*** kl. 12.00, altarg., (skriftamál kl. 11.50), Marjun Bæk
***Sandavágur:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Sørvágur:*** kl. 11.00 Uni Næs
***Svínoyar kirkja:*** kl. 12.00, altarg.,
***Hattarvíkar kirkja:*** kl. 18.00, altarg., Elsa Funding
***Árnafjørður:*** kl. 11.00 John Myllhamar
***Fuglafjørður:*** altarg., David Johannesen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00 Hanne Sander. ***Kl. 16.00*** Orgulkonsert v/ Dan Kjær Nielsen
***Skála:*** kl. 11.00, Jógvan Fríðriksson
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.10 Jógvan Fríðriksson
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, Jónsvein Bech

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 10.45 Familjumøti, kl. 22.00 Útifundur á Vaglinum.
www.filadelfia.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti við Maibritt og Steinbjørn Jakobsen.
www.gospel.fo

**Katolska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
75 ára dagur fyri Katolsku kirkjuna í Føroyum.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ bispi Czelaw Kozon í Mariukirkjuni. Talvan gongur fyri Pæturspeningi.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 16.00 til 18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Týsdagin 27. juni: Fyri tey sum lesa »True Life in God« (Vassula Ryden) »Satt lív í Guði«. Bønarløta verður síðsta týskvøld í hvørjum mánaði kl. 19.30 í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Lívdin**
Onki tiltak á Brekku vegna húsbólkarnir samlast.
***Í Hoyvíkar skúla:***
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka, kl. 12.00 Tilbiðjunarmøti, á báðum møtunum luttekur ungdómur í Lívdini. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00.
www.livdin.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20.00 Vegna umbygging av Ebenezer verður ungdómsmøti í Hebron.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Djóni Thomassen. Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, har filmurin Martin Luther verður sýndur.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Alfred Olsen, Marjun og Kristina syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Evni: Ápostlasøgan.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Fótbóltscafé, síðsta møti áðrenn summarsteðgin - er í Hebron á Argjum.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting - Evni: Ápostlasøgan, kl. 18.00 Evangel. møti - Evni: Ápostlasøgan.
www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Í summarhálvuni hava vit onki morgunmøti.
Kvøldmøti hvønn sunnudag kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og útimøti í Vestmanna.
Fríggjadagin kl. 18.00 Bøn í Saron.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Kedron, Sørvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Samkomukunning fyri alla samkomuna.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Richard Danielsen talar. Evni: Rómbrævið 1. kap. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen. Øll hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týsdagin kl. 21.30 Bønarløta.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími við Hans Eiler Hammer.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjadagin kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Hansu Simosen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Týsdagin kl. 19.30 Bíbliutími fyri ung.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin er Morgunbøn og Ungdómsróp avlýst.

Sunnudagin er onki møti og ongin sunnudagsskúli. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er Morgunmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími, Kol. 1. kap.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 19. juni***
kl. 10.00-10.30 Opið hús
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, landastrok, telving, dart og onnur spøl
kl. 14.00-17.00 Nøvn á gamlar myndir, Birgar Johannesen
***Túrur til Suðuroyar við nýggja Smyrli 29. juni. Úr Havn kl. 10.00 og av Tvøroyri kl. 15.30. Døgurði umborð, síðan busstúrur. Kostnaður 230,- Gjaldast við tilmelding.***
***Týsdagin 20. juni***
kl. 10-11.30: Sangur. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 12.00-17.00: Opið hús
***Mikudagin 21. juni***
kl. 10-12.00: Handverk. Vegleiðing er á staðnum
kl. 12.00: Vit eta egnan matpakka
kl. 15.00: Urtagarðsvitjan (Michael Jacobæus) Vitja urtagarðin hjá Elsu (Mitens) og katólsku kirkjuna. Tilm. 316491
***Hósdagin 22. juni***
kl. 10-12.00 Opið hús
kl. 14-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát. : Vegleiðing á staðnum.
***Fríggjadagin 23. juni***
kl. 10-17.00: Opið hús
kl. 15.00: Jákup Thomsen
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Týsdag:***
kl. 15.00 Vit syngja úr Føroya fólks. Listin liggur í Tilhaldinum at melda til bowling.
***Mikudag:***
Kl 15,00 Fara frá Tilhaldinum til Lorvíkar at bowla
***Hósdag:***
Stongt.
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin tann 26. juni hava Beinta og Páll Michelsen, Froðba, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima við vælkomst sunnudagin 25. juni frá kl. 12.00-18.00.

18. juli hava Petsy og Thormóð Nielsen, Skopun, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 15. juli kl. 19.00 í Samljóð. Tey, ið vilja gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 28. juni á tlf. 361630 ella 222665.

Týsdagin 25. juli hava Maureen og Petur Hammer, Tvøroyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í høllini í Trongisvági leygardagin 22. juli 2006 kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. nr. 371637 og 284037.

Mánadagin 31. juli hava Henny og Óli Karl Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00 sama dag. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 456719 ella 227322.

1. august hava Ann og Poul Jákup Mohr, Fuglafjørður, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík, leygardagin 5. august kl. 18.00. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 444655.

**Brúdleyp**
24. juni kl. 11.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Martinsdóttir og Niels Viggo Niclasen, bæði úr Havn.

Leygardagin 24. juni kl. 15.30 giftast í Kings College Chapel í Aberdeen, Rachel Lois Jack, kostráðgevi, Aberdeen og Rúni Djurhuus Joensen, sivilverkfrøðingur, sonur Karin og Eyðun, Tórshavn. Veitsla verður hildin fyri innbodnum á Maryculter House Hotel eftir vígsluna. Brúdleypsadr.: 6 Campsie Place Aberdeen AB15 6HL Scotland.

Leygardagin 24. juni kl. 12.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Jákupsdóttur og Sakaris Bech, Tórshavn. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru hjartaliga vælkomin í Sjónleikarhúsið ímillum kl. 13.00-18.00.

Leygardagin 24. juni kl. 10.30 giftast í Kelduni í Skálafirði, Dora Jacobsen, Saltangará og Petur Olivur Splidt, Tórshavn. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 1. juli kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Tórunn Sjóvará Poulsen, Tórshavn og Øssur Joensen, Skopun. Døgurði verður á Hotel Hafnia fyri innbodnum. Kl. 19.00 verður opið hús í Gortrugøtu 26, 188 Hoyvík.

Leygardagin 1. juli giftast í Havnar kirkju **kl. 10.00** Heidi Petersen og Hans Jacob Kollsker. Veitslan verður í HB húsinum kl. 13.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá innan 24. juni á tlf. 311013 ella 313262.

Leygardagin 15. juli kl. 14.00 giftast í býráðssalinum í Tórshavn, Durita Müller, Tórshavn, og Arnfinn Guðjonsson, Klaksvík. Veitslan verður hildin í Pálsstovu kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 24. juni á tlf. 312424, 456268, ella á telduposti a.gudjonsson@yahoo, co.uk

Hósdagin 27. juli kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Sólgerð Viderø, Tórshavn og Jørn Ellingsen Reipå, Norra. Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. juli á tlf. 316832, 596832, 310210, 0047 47235944, 0047 91121330.

Leygardagin 5. august kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Sára Danielsen og Gunnar Olsen, Tvøroyri. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00 verða biðin um at siga frá á tlf. 221190 ella 371611 eftir kl. 16.00 innan 15. juli.

Leygardagin 12. august kl. 14.00 giftast í býráðssalinum í Tórshavn, Guðrið Bogadóttir Vinther, Tórshavn og Magni Jøkladal Hansen, Fuglafjørður. Veitslan verður hildin í Argja Róðrarneysti kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 316698, 444617, 222248, 504132, ella á telduposti hdesign@post.olivant.fo

Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju Beinta Nón, Fuglafjørður og Terji Lervig, Leirvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Um tú vilt vera við til at gleða brúðarparið, kanst tú tekna teg við at ringja tlf. 223815, 775456 ella t-post brudleyp@gmail.com áðrenn 6. august.

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Randi Fríðvør Poulsen, Tórshavn, og Sigurd Hentze, Skopun. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 322206 ella 222137.

**Prógv**
20. juni var Jacobina í Lambanum útlærd sum skrivstovunæmingur innan fyrisiting hjá P/f Poul Hansen, heilsølu.

Kristjan Petursson av Strondum hevur á Ingeniør Háskúlanum í Keypmannahavn tikið prógv sum KT verkfrøðingur.

Fríggjadagin 16. juni hevur Jóna Dahl, Hoyvík fingið prógv sum statsautoriseraður fótterapeutur á Randers Tekniske Skole í Randers.